HOYVÍKAR SKÚLI

Skúlastýrisfundur

Týsdagin, 2. februar 2016 kl. 16:30

Á fundinum vóru:	Una Matras, Karin Dahl, Birgir Kass, Bjørghild Djurhuus og Manne Persson
Avboð:	Jógvan Arge
Skrivari:	Birgit Arge

Skrá

Nýtt frá leiðslu/skúla:

Undanroyndir til Landsroyndina verða fyrst í februar 2016.

9. flokkur í Hoyvíkar skúla verður umboðaður í ungdómstinginum.

Vit høvdu eitt sera gott skeið í floksleiðslu 19. januar 2016. Seinni dagurin verður 29. februar 2016.

Lærararnir høvdu ein uppfylgjandi fund 1. februar 2016.

Skúlin skipar fyri føstulávintshaldi mánadagin 8. februar 2016.

Matarskipanin er farin at virka.

Ein lærari er farin í farloyvi, og vit hava funnið ein annan í hennara stað.

Heilsusystir kemur aftur í Hoyvíkar skúla. Hon eitur Sára Gullfoss, og hon byrjar fyrsta dagin.

Nú eru 6 starvslesandi úr Danmark í Hoyvíkar skúla.

Nýtt frá lærarum:

Trivið varð aftur í telefonprátið. Hoyvíkar skúli hevur enn ongan fastan felefonpolitikk. Tað arbeiðið liggur fyri framman.

Nýtt frá Tórshavnar kommunu:

Einki nýtt frá Tórshavnar kommunu.

Nýtt frá foreldraumboðunum:

Avgjørt var at bíða við fundinum við foreldraumboðini og í staðin arbeiða fram ímóti einum felags foreldrafundi. Evnið skal vera okkurt um talgilda skúlan.

Una Matras, forkvinna í skúlastýrinum, kannar møguleikan at fáa tveir fyrilestrarhaldarar umboðandi hvør sítt sjónarmið. Fundurin skal vera í seinni heldt av februar 2016.

Fundurin lokin kl. 19:00.